## Undirskjal til kommunustýrisskipanina

## NEVNDIR SAMBÆRT AÐRARI LÓGGÁVU

---

### Tilbúgvingarnevnd samb. Tilbúgvingarlógini, frá 15. mai 2012, §12.

1. Kommunustýrið skipar eina Tilbúgvingarnevnd til fyrisiting av kommunalu tilbúgvingini.
2. Kommunan skal seta ein tilbúgvingarleiðara, ið hevur rakstrar- og átaksábyrgdina av kommunalu tilbúgvingini.
3. Formaður í nevndini er borgarstjórin. Aftrat honum er tilbúgvingar-leiðarin, eitt umboð fyri Føroya Landfúta og ein meiriluti, tilnevndur av kommunustýrinum.
4. Kommunur, sum eru felags um kommunala tilbúgving, skulu hava felags Tilbúgvingarnevnd og felags tilbúgvingarleiðara. Í felags Tilbúgvingar-nevndini situr ein meiriluti, sum kommunustýrini tilnevna, felags tilbúgvingarleiðarin og eitt umboð fyri Føroya Landfúta. Borgarstjóri er formaður.
5. Val av limum í Tilbúgvingarnevndina fer fram aftan á hvørt kommunustýrissval.

## ONNUR VIÐURSKIFTI

### Umboðan

Fugloyar Kommuna er limur í:

- Kommunufelagnum. Borgarstjórin umboðar kommununa.
- SEV. Borgarstjórin umboðar kommununa.
- IRF. Varaborgarstjórin umboðar kommununa.

*Stk. 2.* Tiltakslimir verða valdir millum kommunustýrislimirnar aftaná at kommunustýrið hevur skipað seg.

### Kommunal samstørv

Fugloyar Kommuna hevur samstarvssáttmála við:

- Klaksvíkar Kommunu / Norðoya Bú- og heimatænastu.

*Stk. 2.* Borgarstjórin umboðar kommununa. Tiltakslimir verða valdir millum kommunustýrislimirnar aftaná at kommunustýrið hevur skipað seg.